# Stjóri til Framtaksgrunn Føroya

Framtaksgrunnur Føroya søkir stjóra til at fyriskipa og mynda dagligu lei›slu grunnsins.

## Starvi›

Saman vi› nevndini, fær stjórin ábyrgd av dagliga rakstrinum av Framtaksgrunni Føroya. Grunnurin er vinnurekandi og íløgur ver›a solei›is mettar út frá handilsligum grundreglum. Eftir hesi a›alreglu, skal stjórin meta um n‡ggjar verkætlanir og eisini hava virknan lut í útinnan av n‡ggju strategi grunnsins, har talan er um at lata vitan saman vi› fígging.

## Høvu›suppgávur

· Finna fram og meta um n‡ggjar verkætlanir.
· Fyrireika tilmælir at leggja fyri nevndina.
· Uppfylging av gjørdum íløgum.
· Søla av gjørdum íløgum.
· Fyriskipa arbei›i› á skrivstovu grunnsins.

## Persónurin

N‡ggi stjórin skal vera mi›søkin og framtakshuga›ur. Harafturat er ney›ugt, at vi›komandi dugir væl at meta um vinnuligar møguleikar. Dentur ver›ur eisini lagdur á gó›ar samskiftiseginleikar, at vi›komandi er opin og úti um seg og førur fyri at arbei›a sjálvstø›ugt.

## Førleikin

Dentur ver›ur lagdur á, at umsøkjari hevur vi›komandi, ástø›iliga útbúgving frá hægri lærustovni. Somulei›is er ta› ein fyrimunur um umsøkjari kann vísa á úrslit í verki. Eitt væl grunda› samfelagsligt og vinnuligt innlit, ver›ur rokna› sum sjálvsagdur lutur.

## Vit bjó›a

Framtaksgrunnur Føroya hevur ein sentralan leiklut í føroysku vinnuni og setti stjórin fær sjálvur høvi at menna og ávirka virksemi grunnsins komandi árini. Stjórin kemur at virka í einum spennandi og avbjó›andi umhvørvi, har birting og n‡hugsan eru gerandiskostur. Lønin ver›ur sett eftir útbúgvingum og royndum.

## Umsóknir

Umsóknir, i› ver›a vi›gjørdar í trúna›i, skulu innan 20. mars 2000, saman vi› avriti av prógvum og CV sendast til:

Framtaksgrunnur Føroya
Bøkjarabrekka 9
Postrúm 3157
110 Tórshavn

Nærri kunning um starvi› fæst vi› at venda sær til Wilhelm Petersen, nevndarformann. Tlf. arbei›i: 350 100, Heima: 310 678.

www.framtak.fo

Framtaksgrunnur Føroya er ein vinnurekandi grunnur, i› hevur sum endamál, at gera íløgur í n‡ggj ella ví›ka› vinnutiltøk í Føroyum. Íløgurnar skulu hava eitt langsikta› kapitalavkast, i› stendur mát vi› vá›an. Eisini leggur Framtaksgrunnurin dent á verkætlanir vi› høgum vitanarinnihaldi. Íløgan hjá Framtaksgrunninum kann ver›a íløgd sum partapeningur ella sum ábyrgdarlán. Framtaksgrunnurin avhendar síni partabrøv tá rakstur og felag metast at hvíla á einum bur›ardyggum grundarlag.

stephanssons hús

# Bilur við skaða til sølu

**(bilurin hevur verið á sjónum)**

**Merki:** Toyota Hi-Lux 2,4 Pickup
**Árg.:** 12/12-1996
**KM:** 46.661

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Mogens Petersen, 826 Trongisvágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 37 38 90 • fax nr. 37 31 17
at hitta millum kl. 08.00-10.00

**Lesið sosialin**

# Pedagogur

## til Dagstovnin í Fuglafirði

Søkt verður eftir pedagogi, 30 t. viku, at byrja 15.04.2000, ella skjótast tilber. Starvið er á stovu við 18 børnum í aldrinum 3-8 ár.

Lønin verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran í dagstovninum tlf. 444940.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 22. mars kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 6. mars 2000
**Fuglafjarðar býráð**

*Lýsið í* **sosialinum**

## Søkt verður eftir

# TEKNISKUM LEIÐARA

## til Skipasmiðjuna á Skála

**Starvið:**
Sum tekniskur leiðari fær tú ábyrgdina av øllum tekniskum spurningum á Skipasmiðjuni. Tekniski leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við beinleiðis tilvísing til stjóran. Tekniski leiðarin skal vera við til at menna virkið tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi. Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at vera tekniskt tengjulið millum virkið, viðskiftafólk og myndugleikar
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiðið og menning av virkinum
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga
- at vera formonnum og starvsfólki annars til hjálpar í tekniskum spurningum
- at leiða tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er maskinverkfrøðingur og/ella hevur víðkað maskinmeistaraprógv
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir
- hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert før/ur fyri at taka avgerðir
- dugir væl at málbera teg á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli, bæði skrivliga og munnliga

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 441155.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**Skipasmiðjuna á Skála**
att.: Jón Danielsen
FO-480 Skála

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 10. mars 2000.

SKIPASMIÐJAN
Á SKÁLA
**www.faroeyard.fo**
**skala@faroeyard.fo**

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju. 75 fólk starvast á Skipasmiðjuni, sum í løtuni hevur sáttmála við Føroya Landsstýri um nýggja Sandoyarferju, ið skal latast um ársskiftið.



# Betri svøvn

## BIOflex magnetviðgerð tí:

- BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Sosialurin - 311820

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí. Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.



**Ring 21 79 16**

**Viðgerð, ið virkar ímóti:**

- Øllum slagi av pínu
- Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni
- Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

**BIOflex® MAGNET TERAPI**

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916



# HONDA

**Streymgeneratorar**



**HONDA**
- Streymgeneratorar
- Vatnpumpur
- Grund/Dykkpumpur

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**Føroya størsta úrval av**

# PAKKITILFARI

**úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

Vit útvega eisini:
* **Plastbakkar**
* **Pakkibond, tape**
* **Merkir, etikettir**
* **Knívar**
* **Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.**
* **Ymisk tól til ídnaðin**
* **Reingerðisevnir**
* **Tilsetningsevnir**
* **Plattar**
* **Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari**

*...sjálvandi til besta prísin!!*

**FARPACK**

*Staravegur 5, P.O. Box 171*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*

# GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Bluebird**
2.0 LX 5F, gráur, 5 hurðar, 216.000 km.
**18.000**

**Nissan Patrol**
3.3 Turbo S/R, reyður, 5 h., árg. 1988, 185.000 km.
**38.000**

**Peugeot**
106 1.4 XR, svartur, 3 hurðar, árg. 1998, 32.000 km.
**88.000**

**Peugeot**
306 GTi Premium, svartur, 3 h., árg. 1999, 10.000 km.
**195.000**

**Peugeot**
406 ST 2.1 DT, beige, 4 h., árg. 1997
**155.000**

**Citroen Xantia**
TD, vínreyður, 5 hurðar, árg. 1995, 161.000 km.
**105.000**

**Opel Astra**
1.6 Sedan, reyður, 4 h., árg.1996, 39.000 km.
**95.000**

**Peugeot**
306 GLX 1.4, grønur, 5 hurðar, árg. 1997
**105.000**

**Rover**
214, hvítur, 5 hurðar, árg. 2000, 3.000 km.
**128.000**

**Suzuki Baleno**
1.3 GL, bláur, 4 hurðar, árg. 1998, 22.000 km.
**118.000**

**Toyota Corolla**
1.3, reyður, 3 hurðar, 190.000 km.
**15.000**

Bilarnir finnast eisini á: **www.nissan.fo**

Sosialurin

**Meinhardt Arge**
Tjaldursvegur • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

# Eysturoyar Røktar- og ellisheim

søkir: **sjúkrasystir** 0,7 tíð til skiftandi vaktir at byrja 01.05.2000. Tveir **sjúkrahjálparar/heilsuass.** 0,7 tíð at byrja 01.05.2000.

Avloysara fyri **sjúkrasystir** 0,7 tíð í tíðarskeiðnum 01.04.2000-31.01.2001.

Avloysarar fyri **sjúkrasystrar og sjúkrahjálparar/heilsuass.** í tíðarskeiðnum 01.06.-31.08.2000.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar størvinum viðvíkjandi fæst við at venda sær til fyristøðumannin, tlf. 448185 ella 448201.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. verður at senda til

**Eysturoyar Røktar- & Ellisheim**
**att: fyristøðumaðurin**
**620 Runavík**

**innan 22.03.2000**

STARV sosialurin

# Grafikari til Sosialin

Søkt verður eftir grafikara til Sosialin at byrja 1. apríl ella skjótast tilber.

Umsøkjarar við grafiskari útbúgving og roynd innan blaðumbróting hava fyrimun.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Prentarafelag og Føroya Prentsmiðjufelag.

Umsókn, merkt grafikari, verður at senda til:

Sosialurin, box 76,
110 Tórshavn

Í seinasta lagi 20. mars.

*Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sosialin 311820 og spyrja eftir Torkil Johannesen.*

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Har starvast í dag umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna. Á prentsmiðjuni, sum er partur av fyritøkuni, verða umframt Sosialin eisini prentað onnur bløð. Sosialurin umsetti í fjør fyri uml. 10 milliónir krónur. Á grafisku deildini starvast 7 fólk harav 2 lærlingar. Deildin er útgjørd við teimum mest framkomnu teldunum og forritunum innan tað grafiska.

sosialurin sosialurin

**Barnagarðurin á Velbastað søkir eftir einum**

# pedagogi

30 tímar um vikuna at byrja 1. apríl.

Eisini verður søkt eftir pedagogum at byrja 1. august ella eftir avtalu. Arbeiðstíð: 30–40 tímar um vikuna.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmálan millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Til starvið, sum verður sett 1. apríl, skulu skrivligar umsóknir vera barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 20. mars.

Barnagarðurin hevur eina vøggustovu við 10 plássum til børn millum 0 og 3 ár og eina barnagarðsstovu við 20 plássum til børn millum 3 og 8 ár. Opið er frá kl. 7.30 til 17.30.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til barnagarðin.

**Barnagarðurin á Velbastað**
176 Velbastað • tlf. 328121 • fax 328077
teldupostur: velbarn@post.olivant.fo

# Havnar Arbeiðskvinnufelag

Lýsti aðalfundur felagsins verður leygardagin 11. mars kl. 14.00 á Hotel Hafnia.

**Skrá:**
1. frágreiðing frá farna árinum
2. grannskoðaður roknskapur til góðkenningar
3. møguligar lógarbroytingar
4. støðutakan til lívstrygging og eftirløn
5. innkomin uppskot
6. val av formanni, 2 nevndarlimum 0g 2 tiltakslimum
7. val av grannskoðara
8. áseting av løn til formann, skrivara og nevndarlimir
9. ymiskt

**Valevni til formann:**
Vígdis Johannesen
Ethel Mortensen

**Nevndin**

*Halt* **sosialin**